# Sjúkrahúsvegurin asfalteraður

**Vegurin fram við Landssjúkrahúsinum, sum gongur út ímóti Argjum er nú endiliga asfalteraður**

VEGAGERÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Endiliga er hann liðugur. Vegurin framvið Landssjúkrahúsinum, sum so leingi hevur staðið í gerð, er nú endiliga asfalteraður.

Seinastu vikurnar hevur verið ógvuliga keðiligt at koyrt á vegnum, tí har hava verið so nógv hol og stórir steinar. Men hósdagin varð vegurin so endiliga asfalteraður.

Fram við vegnum er nú gongubreyt á báðum síðum. Hetta ger tað munandi tryggari hjá fótgangarum at ganga heim í býin, tí í einum slíkum bugi kann tað vera heldur svikaligt at ganga á vegnum.

Gongubreytin steðgar nakrar metrar áðrenn krossin millum Velbastaðvegin og Dr. Dahlsgøtu. Hetta kemst av, at seinni skal ein rundkoyring gerast, sum ger tað høgligari hjá ferðsluni, tí um morgnarnar stendur bíðirøðin av bilum langt inn á Argjar.



*Sjúkrahúsvegurin er nú endiliga asfalteraður, er hann munandi betri. Bæði at koyra á og so er hann eisini breiðari*

*Mynd: Finnur Justinussen*


Vikuskifti í Danmark

Prísur fyri hvønn

Føroyar-Keypmannahavn aftur og fram 1.815,-

Føroyar-Billund aftur og fram 1.853,-

(Ferðaavgjøld eru íroknað prísin)

Tað eru serligar reglur galdandi fyri hesar prísir. Tvey fólk skulu ferðast saman og ferðaseðlarnir skulu keypast 7 dagar áðrenn fráferð. Ferðaseðlarnir kunnu keypast til 9. juni 2002, og seinasti heimferðardagur er 17. juni 2002. Talið á hesum ferðaseðlum er avmarkað.

Set teg í samband við eina ferðaskrivstovu ella far inn á www.maersk-air.dk

MAERSK AIR

It's got to be perfect



Byggifrøðingur

Starv í Føroya Banka

Avbjóðandi starv sum byggifrøðingur í Føroya Banka

Eitt spennandi og avbjóðandi starv í fyrisitingardeildini í Føroya Banka er hervið leyst at søkja.
Fyrisitingardeildin varðar av bygningum bankans og fevnir hetta um umsiting og viðlíkahald av 24 deildum kring um Føroyar.
Føroya Banki hevur seinastu árini havt stóran búskaparligan vøkstur og merkist hetta aftur í øktum virksemi og einum alsamt vaksandi kravi um áhaldandi menning og viðlíkahald av deildum bankans.

Starvið

Dagliga starvið fevnir um:

- at umsita og hava umsjón við deildum bankans,
- at standa fyri og samskipa arbeiði við størri ábøtum og/ella nýbygging,
- at hava um hendi samskifti við ráðgevar og arbeiðstakarar,
- at verða við í gerð av ætlanum fyri framhaldandi menning av deildum bankans og gerð av fíggjarætlanum hesum viðvíkjandi.
- luttøku í tvørgangandi arbeiðsbólkum, við atliti til nýinnrætting o.a.
- aðrar ad-hoc uppgávur, ið javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi.

Førleiki

Søkt verður eftir byggifrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og skal tann, ið verður settur hava góð samstarvsevnir og samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Tað er ein fyrimunir, um viðkomandi hevur útbúgving sum handverkari, men er hetta eingin treyt.
Vit rokna við, at viðkomandi hevur royndir innan nevndu arbeiðsøkir og evnar at fyriskipa og hava um hendi stýring av størri verkætlanum.
Er tú áhugaður kunnu vit bjóða eitt spennandi starv, ið er fakliga og persónliga mennandi, við góðum arbeiðsumstøðum.

Treytir

Setanartreytir verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

Umsókn

Hevur tú áhuga at royna nýggjar avbjóðingar, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda umsókn saman við viðkomandi skjølum til:

P/F Føroya Banka
Starvsfólkadeildin
Postboks 3048
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juni 2002.
Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard ella Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tlf. 311350.

FØROYA BANKI




# Ákærin krevur trý ára fongsul

**Størsta narkomálið í Føroya søgu endaði hósdagin, tá ákærin og verjin høvdu sínar seinastu viðmerkingar. Ákærin krevur minst trý ára fongsul, tí talan er um bakmann, sum hevur skipað fyri umfatandi rúsevnasølu. Verjin sigur hægts 20 mánaðir**

NARKOMÁLIÐ
*Stefan í Skorini*

Ákærin Dorte Møller Andersen heldur, at talan er um 14,5 kilo av hassji, 140 gramm av kokaini og 40 gramm av amfetamini, sum tann ákærdi hevur havt um hendi.

Við teimum nøgdum, sum ákærin vísir á, skal tann ákærdi dømast eftir revsilógini og ikki eftir lógini um euforiserandi evni. Revsikarmurin í revsilógini er nógv harðari enn í lógini um euforiserandi evni.

Um talan er um meira enn tíggju kilo av hassji skal dømast eftir revsilógini. Markið fyri kokain er 25 gramm og fyri amfetamin 50 gramm.

Upprunaliga vóru hesar nøgdir væl størri, men tríggjar av ákærunum eru nú útsettar, tí tvey sera týðandi vitni ikki kundu møta í rættinum. Tey eru til skips og koma ikki til landið fyrr enn um nakrar vikur, tá rættarmálið verður tikið uppaftur. Tá fer rætturin av viðgera hesar ákærurnar fyri seg.

Tann eina av ákærunum snýr seg um, at ákærdi skal hava selt umleið tíggju kilo av hassji til ein persón frá 1988 til 2001. Í hinum báðum ákærunum, sum eisini eru útsettar, er talan um 1,5 kilo av hassji, sum ákærdi skal hava selt einum navngivnum persóni, sum eisini er til skips.



*36 ára gamli maðurin, sum er fjaldur undir jakkanum, verður av ákæruvaldinum mettur at vera ein av høvuðsmonnunum í stóra narkomálinum. Hann játtar bert ein lítlan part av ákærunum, sum eru reistar ímóti honum*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Bakmansvirksemi

Ákærin segði í síni endaligu viðmerking, at tann ákærdi hevur skipað fyri einum stórum parti av allari narkotikasølu í Føroyum. Hann er ein veruligur bakmaður, sum hevur skipað fyri innsmugling av rúsevnum. Síðani hevur hann havt aðrar persónar, sum hava fingið smærri nøgdir at selja. Hetta hava fleiri vitnið greitt frá, segði Dorte Møller Andersen.

– Virksemið hjá ákærda hevur verið merkt av professionalismu úr einum enda í annan, og hann hevur selt áhaldandi í eini tíggju ár. Hann hevur fingið fleiri fólk at selja fyri seg, og soleiðis hevur hann skipað fyri narkosølu, segði ákærin.

– Tey klóku narra tey minni klóku, segði Dorte Møller Andersen, og hon sipaði til, at tann ákærdi hevði nýtt hentar býttlingar at gera skitna arbeiðið fyri seg.

Hon legði eisini dent á, at fleiri fólk høvdu fingið sterk rúsevni fyri einki at byrja við, og hetta var fyri at leggja grundarlag undir einum marknaði í Føroyum.

Hon mælti til, at 36 ára gamli maðurin fær ein dóm, sum ikki er minni enn trý ár í fongsli. Harumframt skal hald leggjast á 875.000 krónur hjá ákærda. Hetta er yvirskotið, sum maðurin hevur havt av rúsevnasølu.

Ákærin segði, at tann ákærdi hevði havt ein vinning á 50 krónur fyri hvørt grammið av hassji og 800 krónur fyri grammið av kokaini.

## Broyttar frágreiðingar

Verjin Christian Andreasen legði hart eftir ákæruvaldinum í síni seinastu viðmerking. Hann segði, at tað hevði nýtt óreiðiligan taktikk í hesum málinum.

– Øll vitnini hava broytt sínar frágreiðingar frá teirra egna rættarmálið, tá tey hava vitnað í hesum málinum. Næstan øll vitnini hava sagt, at tey vóru undir trýsti frá løgregluni, og tí gingu tey við til at játtað størri nøgdir, enn tey í veruleikanum hildu vera rætt, segði Christan Andreasen.

Hann segði, at ákæruvaldið ikki hevði lagt nakað objektivt prógv fram, men hevur hildið seg til fleiri óálítandi vitni. Hann legði dent á, at einki vitni hevði sagt tí ákærda ímóti. Tí skuldi frágreiðingin hjá tí ákærda í størri mun takast til eftirtektar.

Verjin segði, at tann ákærdi í mesta lagi kundi játta at hava havt 3,9 kilo av hassji og 93 gramm av amfetamini um hendi í brutto. Hann vísti á, at fleiri av teimum nøgdum, sum ákæruvaldið vísti á, vóru tikin við í ákæruritið fleiri ferðir. Tað var tí ikki rætt at taka somu nøgdirnar av rúsevnum við fleiri ferðir.

Tí skuldu tvey kilo av hassji dragast frá, so at tann ákærdi játtaði bert tvey kilo av hassji og 93 gramm av amfetamini og kokaini. Verjin vísti harumframt á, at sambært vitnunum var bara talan um umleið sjey kilo av hassji og 99 gramm av sterkaru evnunum.

Verjin vildi eisini vera við, at eingin skipað søla av hørðum rúsevnum var farin fram. At ákærdi er bakmaður í slíkum virksemi, hevði ákæruvaldið tikið úr leysum lofti.

Í sambandi við revsingina segði verjin, at hon í hægsta lagi kundi vera 23 mánaða fongsulsrevsing. Tær 14 vikurnar, sum ákærdi hevur sitið avbyrgdur, skuldi eisini geva honum avsláttur, so at revsingin kundi hóskandi vera 20 mánaðir handa rimar.



*Christian Andreasen, verji hjá tí ákærda, heldur, at revsingin í mesta lagi kann vera 23 mánaða fongsulsrevsing*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Ákærdi fekk síðsta orðið

Tann 36 ára gamli danin fekk seinasta orðið, áðrenn rættarfundurin kom at enda. Hann greiddi frá, at hann hevði smuglað tvey kilo av hassji til Føroyar fyri at koma úr fíggjarligu trupulleikunum, sum felag hansara var komið í.

Hann segði eisini, at hann hevði játtað alt, sum hann av røttum kundi kennast við, og at hansara leiklutur í narkoumhvørvinum í Føroyum als ikki hevði verið so stórur, sum ákæruvaldið vildi vera við.

Hann legði afturat, at hann hevði verið misnýtari av rúsevnum, og at henda misnýtsla var orsøkin til, at hann var farin ov langt hesum viðvíkjandi.